Fiskamarknaðurin í Klaksvík:

# Leingist eftir konufólki



*Kristjan Fríðrik Olsen, leiðari á Fiskamaknaðinum í Klaksvík*



*Fiskamarknaðurin keypti í 2000 hølini frá Kósini*

FISKIVINNA
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Reportasja, Klaksvík:** Rami lukturin hongur sum eitt teppi í luftini, og er tað fyrsta, ein leggur merki til, tá ein trínur inn um dyrnar. Komin upp trappurnar verður lukturin skiftur um við ein lukt av máling. Ì eini skrivstovu standa tveir menn í arbeiðsklæðum og mála, og í einum øðrum rúmi hava tvey sett seg við einum kaffimunni og lagkøku. Vit eru komin inn í landingarmiðstøðina hjá Fiskamarknaði Føroya í Klaksvík.

Leiðarin, Kristjan Fríðrik Olsen, býður mær inn á hansara skrivstovu.

– Her er eitt sindur rokaligt í dag; men soleiðis er, tá nógv er at gera, smílist hann.

### Eitt konufólk

Umleið 35 fólk starvast dagliga á Fiskamarknaðinum, men er nógv at gera, koma fleiri fólk til arbeiðis. Út av hesum 35 er bara eitt konufólk, men hóast hon er einsamøll, so trívist hon óføra væl.

– Hetta kemst ikki av, at vit ikki vilja hava konufólk her, flennir Kristjan Fríðrik.

– Tað er óført at hava nógv konufólk til arbeiðis, men tíanverri eru tað alt ov fáar, ið tíma hetta arbeiðið. Møguliga, tí tað kann verða í so hart, tá nógv er at gera. Men konufólk arbeiða nógv skjótari enn mannfólk, so tað hevði verið gott at havt fleiri, og tær skulu vera hjartaliga vælkomnar, sigur Kristjan Fríðrik.

### Tvær uppboðssølur

Fiskamarknaður Føroya er ein landingarmiðstøð, har fiskur verður landaður og síðan skildur til antin uppboðssølu ella aðrar fyritøkur.

– Vit hava tvey sløg av uppboðssølum hvønn dag, greiðir Kristjan Fríðrik frá.

– Tann primera sølan er gólvsølan, sum vit hava tvær ferðir um dagin. Har selja vit fiskin hjá smábátunum, ið eru komnir inn at landa. Fiskurin verður landaður og skildur, og síðan settur fram á gólvið, so hann er tøkur hjá keyparunum.

Ein listi verður so útskrivaður ein tíma, áðrenn sjálv sølan byrjar, og verður listin sendur út til keypararnar. Her síggja keypararnir, hvønn fisk vit hava, og keypa teir so út frá hesum. Teir flestu keypararnir koma sjálvir inn á gólvið fyri at keypa, men annars er eisini møguligt at vera við gjøgnum telefon ella á alnótini.

Hin sølan er ein telefonsøla, sum vit hava einaferð um dagin. Hetta er fiskur frá teim størru bátunum, sum hava verið úti í fleiri dagar. Nakrar dagar áðrenn báturin kemur í land, sigur hann okkum, hvussu nógvan fisk hann væntandi kemur at hava, og út frá hesum bjóða vit fiskin víðari, greiðir leiðarin frá.



*Alexandra Kjærbo er fyrilbils einasta konufólkið, sum starvast á Fiskamarknaðinum. Uppgávurnar hjá henni eru fleiri í tali, og mannfólkið sigur flennandi, at hon nærum stýrir øllum í húsinum.*
*– Eg havi verið her, líka síðani Fiskamarknaðurin byrjaði her norðuri, og mær dámar heilt ótrúliga væl.*
*– Viðhvørt kundi eg tó hugsað mær, at okkurt annað konufólk eisini var á staðnum. Men samanhaldið er gott og lønin góð, so eg kundi ikki hugsað mær at verið nakra aðrastaðni enn her*

### Prísurin lækkaður

Nærum allir bátarnir í Norðoyggjum landa hjá Fiskamarknaðinum, og av tí sama taka tey ímóti fleiri sløgum av fiski.

– Men um vit hyggja at tølunum, so síggja vit, at um 40 % av øllum er toskur, 20 % er hýsa og restin ymiskt annað, sigur Kristjan Fríðrik.

Á jólum varð nógv tosað um tann høga prísin, ið bátarnir fingu fyri fiskin. Men hetta er broytt í dag, sigur leiðarin á Fiskamarknaðinum.

– Prísurin var heilt óvanliga høgur fyri tveimum mánaðum síðan. Tá kundu bátarnir fáa heilt upp í 30 krónur fyri hvørt kilo av toski 1, meðan hann nú liggur heilt niðri á teim 21 krónunum. Men hann er spakuliga á veg uppaftur, greiðir Kristjan Fríðrik frá.



### Skulu betra umstøðurnar

Í novembur í 2000 keypti Fiskamarknaður Føroya bygningin, ið tey húsast í, frá P/f Kósini, sum tey heilt frá byrjan av hava havt sera gott samstarv við.

Og beinanvegin varð løgd ein miðvís ætlan, hvørs endamál skal verða at betra um arbeiðsumstøðurnar hjá arbeiðsfólkunum.

Tá nógv er at gera, merkist tað eisini aftur á arbeiðsdøgunum hjá fólkunum. Í løtuni arbeiða tey ikki í vaktum, og tí kunnu dagarnir lættliga gerast strævnir og langir.

– Men soleiðis er við øllum fiskaarbeiði. Tá nógvur fiskur er, so arbeiða vit ómetaliga nógv og hart. Tá so eingin fiskur er, so er heldur einki arbeiði, greiðir Kristjan Fríðrik frá.

– Av tí sama vilja vit, at arbeiðsfólkið skal hava góðar umstøður rundan um seg. Tey skulu trívast, meðan tey eru til arbeiðis, sigur Kristjan Fríðrik.

Hetta hevur ført við sær, at arbeitt verður við at fáa sum mest sjálvvirkna útgerð inn í hølini.

– Endamálið er, at fáa alt tað tunga arbeiðið at verða sjálvvirkandi, og ætlanin er so eisini at fáa nakrar skiljilinjur inn, sigur Kristjan Fríðrik.

– Hetta skuldi gjørt, at vit betri kunnu gagnnýta tíðina, og harvið eisini fáa ein meiri skipaðan gerandisdag.

Á hendan hátt skuldi arbeiðið gingið skjótari, og tí kunnu vit bjóða kundunum eina betri tænastu, sigur Kristjan Fríðrik at enda.




SKÍÐFERÐ - til Fraklands á páskum
28.mars - 8. apríl 2002
Seinasta tilmeldingarfreist 7. mars
MB-Tours
Tel 32 21 21 · Fax 32 21 22 · mb-tours@mb-tours.com
www.reproz.com



COMPAQ
19.495,-

**Compaq Presario 1722EA**
- PentiumIII 1133MHz
- 256MB RAM
- 20GB Harddisk
- 14,1” TFT Skerm
- DVD/CD-Brennara kombi
- Digital video inn
- 56K Modem
- ATI Radeon Grafik
- 10/100 Mbit netkort
- Windows XP
- Word 2000, Works o.a.
- Norton Antivirus



4.400,-



**Fotoprintari**
**HP Photosmart P1315**
- 6cm LCD litskýggja
- PhotoRet III fotogóðsku
- 17 síður um min. svart
- 13 síður um min. litir
- Skrivar beinleiðis frá korti
- 3 innbygt portur

www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476173 Saltangará tlf. 449840



Sosialurin

Fiskivinnublaðið 2002

Í Sosialinum 13. mars verður stórt innlegg um fiskivinnuna. Tað fer at snúgva seg um okkara fiski-, ali- og sjóvinnu, bæði á sjógvi og landi.

Umframt vanligu útbreiðsluna verður Sosialurin hendan dagin eisini sendur øllum reiðaríum og skipsmanningum umframt at blaðið verður ókeypis at fáa á Fiskivinnuráðstevnuni "Kappingarføri og lønsemi hjá fiskivinnuni" sum Farec skipar fyri á Hotel Föroyum 15. mars. So útbreiðslan 13. mars verður nógv størri enn vanligt.

Tí heita vit á tykkum, sum selja/umboða skipsútgerð og útgerð til sjóvinnuna annars, um at lýsa í hesum blaðnum, so hendan útgávan gerst uppaftur meira áhugaverd.

Freistin fyri at fáa eina lýsing við er mánadagin 4. mars.

Hetta er eitt gott høvi at kunna viðskiftafólk tykkara um tað, tit selja/umboða og tær tænastur, tit veita innan høvuðsvinnuna.

Tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, eru vælkomar at venda sær til okkum og fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820 og tosi við

Finnbjørg Nattestad
Marknaðardeildin
*finnbjorg@sosialurin.fo*






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3324
Navn: Sp/f Ásur

Adressa: 520 Leirvík

Kommuna: Leirvíkar Kommuna
Stovningardato: 01.01.2002
Viðtøkudato: 01.01.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Jósleiv Joensen, 520 Leirvík.
Stjórn: Jósleiv Joensen, 520 Leirvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, Gerðisvegur, 600 Saltangará.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, handverk o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 26. februar 2002

Kristin Balle


Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!